# á Gamla Meiarínum




**»Too short«**

**Koreografi: Rannvá Káradóttir saman við dansarunum**
**Dans: Seke Chimutengwende, Rannvá Káradóttir og Kristina Sørensen Ougaard**
**Búnar: Marianna Mørkøre**
**Ord: Seke Chimutengwende**

Tveir stuttir, ljósir, kvinnuligir dansarar – ein langur, myrkur, mannligur dansari.

Svart rúm, ein gul banan. Strammar svartar blusur við stuttum ermum og svartar haremsbuksur. Naknu armarnir og beinini vóru mótsetningar til svørtu búnarnar og svarta rúmið.

Ljóðmyndin var sett saman av orðum, ljóði av dansandi kroppum og tónleiki hjá Frank Zappa og franska bólkinum Tétes Raides.

Koreografur og dansarar spæla sær við kontrastir, bæði í formi og innihaldi.

Maðurin kemur inn í rúmið, bítur í ta gulu bananina. Har afturi í rúminum koma kvinnurnar til sjóndar, við kvikum, hoppandi rørslum. Í somu løtu byrjar maðurin at tosa. Orðafloymurin, ið streymar frá honum, gevur í fyrstu atløgu onga meining, men so við og við vaksa fram hugmyndir um makt, kærleika, ótta og spæl.

Øll trý dansa hvør sær og saman. Tær báðar hoppa, rulla runt á gólvinum, standa á økslini við beinunum upp í loft, dansa við "rundum" rørslum – synkront, sum vóru tær eitt. Hann dansar róliga, við stórum rørslum, leypir meðan hann strekkir se út og upp í rúmið.

Saman við orðunum - og bananini – eydnast tað dansarunum at skapa ein stuttligan og groteskan dans, ið lýsir ymiskar menniskjansligar eginleikar, sum til dømis tað primitiva, tað intellektuella, tað manipulerandi og lokkandi - tað forvitna, góðvarna, undrandi og kannandi.

Brádliga fær ein hóming av yrkingum:

| | | |
|---|---|---|
| **Tons** | tame | **transgressive** |
| **Of** | orchid | **obstinate** |
| **Out** | occasionally | **opportunist** |
| **Stretched** | shy | **seeks** |
| **Hands** | hovering | **hot** |
| **Only** | over | **oral** |
| **Ruining** | rare | **rock** |
| **Tradition** | truth | **therapist** |

(citat úr leikritinum)

Loddrætt lisið geva fyrstu bókstavarnir í orðunum heiti á d 6ansinum "too short"…

Ein sera stuttlig og leikandi løtt framførsla.

Tað er ikki lætt við fáum orðum at lýsa hesar tríggjar framførslur, sum hóast tær einans vardu í ein stuttan tíma, spentu víða og spældu á nógvar streingir. Við tí einfalda og fatanini av at "less is more" megna hesi ungu listarfólkini at geva áskoðaranum eina uppliving, sum ístaðin fyri at tala til "fornuftin" og tað skynsama, talar beinleiðis til allar sansir og hugflogið. Ein situr við stórum eygum og hálvopnum munni og tekur ímóti, letur seg yvirraska og verður drigin við inní teirra søgu – samstundis sum ein fær frælsi til at associera frítt og skapa sínar egnu søgur.

Her eru ongar avmarkingar, bert møguleikin at vera opin, uppliva og taka ímóti.

Vit gleða okkum til at síggja meira!

*»The dance, more than any other art, lives through the genius of its interpreters.« (Lilian Moore, "Artists of the dance")*

